Nr. 5/2020

Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi koronakanningarstøðum, settur landsstýrismanninum við heilsumálum Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um framyvir at lata upp fleiri ókeypis kanningarstøðir kring landið?
2. Heldur landsstýrimaðurin tað vera rætt, at føroyingar rinda fyri kanningarnar hjá útlendingum? Og ætlar landsstýrismaðurin at broyta hetta?

Viðmerkingar

Røddir hava verið frammi um, at fleiri ókeypis kanningarstøðir áttu at verið í Føroyum m.a. í Vágum og á Sandoynni. Hetta fyri at lætta um atkomuna hjá íbúgvum kring landið og samstundis lætta trýstið og bíðitíðirnar í Tórshavn.
Ein privat kanningarstøð er á flogvøllinum, og har er kostnaðurin kr. 390 fyri hvørja kanning. Skalt tú hava ókeypis kanning, skalt tú til Havnar. Sandoyingar skulu tvørtur um Skopunarfjørð.
Harafturat er vert at nevna, at føroyingar skulu gjalda fyri koronakanningar hjá útlendskum ferðafólki, og kostar hetta 2-3 mió. kr. um vikuna úr landskassanum. Samstundis skulu føroyingar rinda kostnaðin fyri at lata seg kanna hjá somu fyritøku. Tað kann undra.
Koronafarsóttin verður væntandi verandi eina tíð afturat, og tí verður helst neyðugt at kanna seg javnan. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á løgtingi 11. august 2020

Jóhannis Joensen